# 91.666 í lønarhækkan

Pensjónsfelagið Danica gevur sínum stjórum eina risa lønarhækkan, sjálvt um tey 770 starvsfólkini í fjør fóru niður í bæði løn og tíð. Henrik Ramlau-Hansen, forstjóri í Danica, fekk í fjør eina lønarhækkan á 30%. Samlaða lønin íroknað pensjón og firmabil – ein Toyota Lexus – var í 2008 3,7 milliónir krónur. Í 2009 hækkaði samlaða lønin við 1,1 millión upp í 4,8 milliónor krónur. Við øðrum orðum eina lønarhækkan upp á 91.666 krónur um árið, skrivar boersen.dk.



# Joachim má spara

Joachim prinsur ætlar at leiga partar av 1200 hektar stóru lanbrúksjørð síni á Schackenborg Gods í Møgeltønder út, skrivar boersen.dk. Sambært blaðnum eru fleiri starvsfólk søgd úr starvi ella eggjað til at finna sær nýggj arbeiði. Umsjónarmaðurin, Søren Frederiksen, sum hevur verið høgra hond hjá prinsinum seinastu 17 árini, hevur boðað frá, at hann gevst á nýggjárinum. Blaðið skilir, at starvið verður niðurlagt. Joachim prinsur yvirtók Schackenborg Gods í 1993 og hevur sermerkt seg innan korn og eplir umframt jólatrø.

# Fáa nú evsta myndugleika í føroyskum

**Verður tað til landsstýriskvinnuna, fáa vit nú eitt málráð, sum fær avgerandi myndugleika í spurningum um føroyska málið**

MÁL

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Longu nú hevur landsstýriskvinnan í mentamálum, Helena Dam á Neystabø, sett ein arbeiðsbólk at skipa eitt málráð, sum fær evsta myndugleika í málsligum spurningum*

Fyrrapartin varð stóra málálitið, sum málstevnunevndin orðaði í 2007, umsíðir lagt til aðalorðaskifti á tingi.

Í upplegginum til orðaskiftið hevur landsstýriskvinnan, Helena Dam á Neystabø, longu gjørt greitt, at ávís tilmæli í álitinum fáa hægri raðfesting enn onnur.

Eitt nú hevur eitt samt løgting longu tikið undir við tilmælinum frá málstevnunevndini um við lóg at skipa eitt málráð, har ymiskar málpolitiskar fatanir verða umboðaðar, og sum fær myndugleika at gera av spurningar av málsligum slagi. Málráðið kemur sostatt í staðin fyri núverandi Føroysku Málnevndina, ið bert hevur heimild at vera ráðgevandi í málsligum spurningum.

## Evstar málreglur

Sjálv heldur landsstýriskvinnan tað hava bæði týdning og skund at skipa eitt slíkt málráð. Tí hevur hon longu sett ein arbeiðsbólk, sum skal gera uppskot til, hvussu vit skipa okkum við eini mállóg, har heimildirnar hjá málráðnum verða lógarfestar. Á tann hátt kunnu vit tryggja, at vit hava ein sakkønan myndugleika, sum til dømis kann staðfesta eina rættskrivingarorðabók, eitt stavrað og taka endaligar avgerðir í málsligum spurningum annars.

Hetta kann fáa rættiliga týðandi avleiðingar, um tilmæli frá málstevnunevndini verður fylgt út í æsir. Sambært málálitinum skal ein nýgg rættskrivingarorðabók við reglum um rættskriving og bending nevniliga løggildast av landsstýriskvinnuni. Hartil skulu skúlar og almennir stovnar hava skyldu til at fylgja reglunum í nýggju orðabókini.

## Almennan málpolitikk

Tilmælini í málálitinum eru øll liðir í, at politiski myndugleikin umsíðir orðar ein almennan málpolitikk. Sambært málálitinum er yvirskipaða endamálið við málpolitikkinum at tryggja føroyskum máli støðu sum fullkomið og samfelagsbært mál á øllum økjum. Tað merkir, at føroyskt eisini í framtíðini skal kunna verða nýtt á øllum økjum í samfelagnum, og at valið skal falla á føroyskt í øllum viðurskiftum, har tað ikki er neyðugt, at fremmandamál verður nýtt.

Eisini formaðurin í málnevndini, Jógvan í Lon, hevur víst á, at tørvurin á einum yvirskipaðum málpolitikki gerst alsamt meir átroðkandi, jú størri lut og prestigu eitt nú enskt tykist at fáa í ymsum málhøpum. Tí er alneyðugt, at politikararnir nú melda greitt út, hvat teir ætla at gera fyri at styrkja og menna føroyska málið, so tað kann standa seg í kappingini móti donskum og enskum og lata pengar fylgja við, staðfestir Jógvan í Lon.

Tað fáa politikararnir so høvi til nú, ið málálitið loksins er lagt til aðalorðaskifti í løgtinginum næstu dagarnar.

# Almennu útreiðslurnar gallopera

**Nýggjastu hagtølini frá Hagstovu Føroya um almennu útreiðslurnar avdúka, at almennu útreiðslurnar vaksa skjótari og skjótari fyri hvørt ár**

HAGTØL

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Úr 2,3 prosentum upp í 11 prosent upp á 4 ár. Almennu útreiðslurnar eru farnar galloperandi uppeftir seinastu árini, og eingin bremsa hevur verið á almennu útreiðslunum frá 2004 til 2008 yvirhøvur.

Frá árunum 2004 til 2005, vuksu almennu útreiðslurnar við 2,3 prosentum, úr 5,83 milliardum upp í 5,96 milliardir krónur. Árið eftir, í 2006, vuksu almennu útreiðslurnar upp í 6,19 milliard krónur, ella 3,8 prosent.

Frá í 2007 komu almennu útreiðslurnar upp á 6,61 milliard krónur, ella góðar 423 milliónir meira, svarandi til ein útreiðsluvøkstur upp á 6,43 prosent.

Nú vísa nýggjastu tølini frá Hagstovu Føroya, at útreiðsluvøksturin ikki steðgar her – tvørturímóti.

Tað almenna kostaði í 2008 7,337 milliardir krónur at reka, svarandi til 725 milliónir krónur meira enn árið fyri. Hetta er ein útreiðsluvøkstur upp á heili 10,96 prosent eftir einum einstøkum ári.

Miðalvøksturin fyri tey seinastu 10 árini er annars 6,28 prosent, sum tað almenna dýrkar at reka fyri hvørt ár.

**Útreiðsluvøkstur frá 1998 til 2008**

Frá 1998 til 1999 - 5,3 prosent.
Frá 1999 til 2000 - 9,35 prosent.
Frá 2000 til 2001 - 6,43 prosent.
Frá 2001 til 2002 - 11,17 prosent
Frá 2002 til 2003 - 2,8 prosent
Frá 2003 til 2004 - 6,64 prosent
Frá 2004 til 2005 - 2,3 prosent
Frá 2005 til 2006 - 3,8 prosent
Frá 2006 til 2007 - 6,84 prosent
Frá 2007 til 2008 - 10,96 prosent



*Eingin bremsa hevur verið á almennu útreiðslunum frá 2004 til 2008 vísa tøl frá Hagstovu Føroya*
*Savnsmynd*